Álit

í

løgtingsmáli nr. 69/2020 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Útseta og flyta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir frá 2020 til 2021, flyta aðrar ófiskaðar makrelkvotur frá 2020 til 2021, strika treytina um veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 í sambandi við ávíst slag av vinnuligum royndum og verkætlanum ávikavist fyri royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur lagt málið fram tann 9. desember 2020, og eftir 1. viðgerð tann 11. desember 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 14. desember 2020.

Málið snýr seg um at útseta og flyta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir frá 2020 til 2021 og at flyta aðrar ófiskaðar makrelkvotur frá 2020 til 2021. Harumframt verða eisini gjørdar fleiri rættuliga prinsipiellar broytingar í mun til veiðiloyvi, atgongd at fiska og møguleika at fáa varandi rættindi.

Málið kom til 1. viðgerð fríggjadagin 11. desember, og Vinnunevndin metir tað ikki vera ráðiligt at skundviðgera málið. Tó hevur tað skund at fáa heimild at flyta ófiskaðar kvotur yvir um ár. Nevndin er tí samd um, at tað í hesum umfarinum er rætt einans at koyra ásetingar um at flyta kvotur tvørturum ár ígjøgnum, og skjýtur tí upp í hesum umfarinum at strika allar aðrar ásetingar um broyting í lógini.

Makrelavtalan, sum Føroyar eru partur av, og sum bert loyvir at flyta 10% av kvotuni tvørturum ár, fer úr gildi 1. januar 2021.
Møguliga verður avtala við bretar gjørd í vikuni um at fiska makrel í bretskum sjógvi. Eydnast tað, kann fiskiskapurin byrja 1. januar, og tí hevur tað skund at avgreiða heimildirnar at flyta størri nøgd av makreli tvørturum ár.

Nevndin tekur undir við at geva landsstýrismanninum heimild at flyta størri nøgdir av kvotum tvørturum ár.

<u>Harumframt hava Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer, Henrik Old og Bjarni Kárason Petersen hesar viðmerkingar:</u>

Undirritaðu vísa harumframt á, at landsstýrismaðurin, sum nú biður um heimild at flyta kvotur til royndir og vinnuligar verkætlanir, hevur havt stóran part av árinum til at avgreiða og býta út hesar kvotur. Landsstýrismaðurin valdi at fara frá leistinum, at ein metingarnevnd eftir fakligum og sakligum metingarstøði býtti út kvoturnar, til sjálvur at velja millum umsóknirnar til kvotur. Tað er átaluvert at drála í so stóran mun, og ásannast má, at landsstýrismaðurin ikki hevur megnað at avgreiða mongu umsóknirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Inngangurin til § 1 verður orðaður soleiðis:
”Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, § 78 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:”.

2. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis:
“(Útseta og flyta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir frá 2020 til 2021, flyta aðrar ófiskaðar makrelkvotur frá 2020 til 2021)”.

3. § 1, nr. 1- 4 verður strikað.
Nr. 5-14 verða eftir hetta nr. 1-10.

4. Í § 1, nr. 5, (sum verður § 1, nr. 1), verður § 14 a orðað soleiðis:
”**§ 14 a.** Avlopsnøgdir av makreli, norðhavssild og svartkjafti, sambært § 14, stk. 1, sum, sambært § 60 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, vóru lutaðar út sum menningarkvota, og har loyvistíðarskeiðið var úti 1. januar 2020, ella sum ikki vóru lagdar um til egnar árskvotur, sambært § 10, stk. 3, 1. pkt. í løgtingslógini, verða, hóast ásetingina í § 14, stk. 1, ikki settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, í 2020.
Stk. 2. Nøgdirnar av makreli, norðhavssild og svartkjafti, sambært stk. 1, sum í 2020 skuldu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, verða í 2021 lagdar afturat nøgdunum, sum, sambært § 14, stk. 1 og § 15, stk. 1 og stk. 2, verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49.
Stk. 3. Nøgdirnar av makreli, norðhavssild og svartkjafti, sum í 2021 verða lagdar afturat samsvarandi stk. 2, kunnu bert gagnnýtast í 2021 og falla hareftir burtur.
Stk. 4. Flutt kvota, sambært hesi grein, verður ikki roknað sum partur av tøku føroysku kvotuni tað árið, ið kvotan verður flutt til.”

5. § 1, nr. 8 - 14, (sum verður § 1, nr. 4 -10) verður strikað.

Serligar viðmerkingar

Til nr. 1:
Inngangurin til § 1 verður orðaður av nýggjum soleiðis, at allar tilvísingar til broytingarlógirnar, ið áður hava broytt løgtingslógina, verða tilskilaðar í eini tíðarrøð.

Til nr. 2:
Frágreiðandi heitið verður broytt samsvarandi broyting nr. 3 og 5 í hesum áliti.

Til nr. 3:
Tær ásetingar, ið ikki beinleiðis snúgva seg um at flyta kvotur tvørturum ár, verða strikaðar.

Til nr. 4:
Orðingin í § 14 a verður orðað av nýggjum.

Sambært broytingini í upprunauppskotinum var hædd ikki tikin fyri ógagnnýttum 2020-kvotum, sambært § 14, stk. 1. Broytingin hevði til endamáls at leggja nøgdirnar sambært § 14, stk. 1 afturat nøgdunum til vinnuligar royndir og verkætlanir frá og við 2021 og restina av loyvistíðarskeiðnum, soleiðis at landsstýrismaðurin frá og við 2021 við stillingum var ájavnt 8,5% øll árini í loyvistíðarskeiðnum. Ynskið er heldur at gera eina reina flyting millum ár. Við hesi broyting verður tað sostatt gjørt greitt, at nøgdirnar verða fluttar frá 2020 til at verða fiskaðar í 2021, men tær kunnu bert gagnnýtast í 2021 og eru ikki partur av tøku føroysku kvotuni fyri 2021. Harumframt hevur landsstýrismaðurin framvegis, tó við undantaki frá 2020, skyldu til at seta øll 8,5 prosentini av tøku føroysku kvotuni av til vinnuligar royndir og verkætlanir, haruppií eru verandi menningarkvotur og menningarkvotur, ið eru umlagdar til egnar árskvotur.

Til nr. 5:
Tær ásetingar, ið ikki beinleiðis snúgva seg um at flyta kvotur tvørturum ár, verða strikaðar.

Ein samd nevnd tekur við hesum broytingum undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 14. desember 2020

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	